




# Kuga – smartur SUV frá Ford

Ford Kuga er ein væl útgjørdur SUV (Sport Utility Vehicle) í eini sera populerari stødd. Talan er um ein rúmligan bil, sum eisini er væl egnaður til barnafamiljur.

Ford Kuga er sera væl móttikin, síðan hann kom á marknaðin fyrr í ár. Bilurin hevur framúr góðar koyrieginleikar, og innrættingin er liðilig. Baklúkan er gjørd soleiðis, at hon kann latast upp í tveimum, og við aftaru setrini eru eitt nú flúgvaraborð til tey ferðandi.

Kuga er bygdur yvir sama plattform sum Ford Focus og C-Max. Kabinan er flott og sportlig við t.d. alulook-panelum og sportsetrum. Hvat útgerð viðvíkur fæst Kuga í útgávunum Trend og Titanium, og hann fæst bæði sum FWD (Front Wheel Drive) og sum AWD (All Wheel Drive).

Umframt 2,0 litra dieselmotorin við 136 hk (320 Nm við 2.000 snún/min) og 6-trins girkassa, fæst Kuga nú eisini við 2,5 litra bensinmotori við turbo 220 hk. Hesin fæst eisini við automatiskum girum.

Ford Kuga líkist burturúr øðrum SUV í hesum klassanum við sermerktum designi, sum er bæði smart og tíðarhóskandi. Kuga er passaliga høgur at sita í og er lættur at koyra og at umgangast í ferðsluni.

**Prísur úr kr: 329.900**


feel the difference | P/F Wenzel

nýggi **Ford Kuga**




Akranesgøta 5 · FO-100 Torshavn · tel 35 45 00 · fax: 354501 · fordpost@wenzel.fo · www.wenzel.fo